# AVTALA

um

# M/S Høgaberg

Í sambandi við at M/S Høgaberg í 2011 partvís fer at vera til fiskiskap og partvís fer at taka ímóti makreli sum móðurskip, hava undirritaðu partar gjørt hesa avtalu.

1.
Tá M/S Høgaberg virkar sum **móðurskip**, verður manningin avroknað eftir hesi skipan:

Manningarparturin er 2.100,- kr. pr. mynstraðan dag.

Harumframt verða avroknaðir hesir eykapartar:

| | |
|---|---|
| Skipari | 1,750 |
| Stýrimaður | 0,825 |
| 2. stýrimaður | 0,500 |
| Maskinstjóri | 0,875 |
| 1. meistari | 0,500 |
| 2. meistari | 0,350 |
| 3. meistari | 0,200 |
| Kokkur | 0,250 |
| 1. kokkur | 0,150 |

Manningin luttekur í landing til plattarnir standa á bryggjuni.

Tá M/S Høgaberg tekur ímóti makreli frá øðrum trolarum eru undirritaðu partar samdir um, at ein av manningini frá hvørjum trolara (um talan er um partrolarar) kunnu arbeiða á dekkinum á M/S Høgaberg í sambandi við móttøkuna av fiskinum. Hesir verða avroknaðir saman við manningini á trolarunum, ið avreiða til M/S Høgaberg.

Við undantaki av reglum um hýru, eru verandi sáttmálaviðurskifti galdandi.

2.
Tá M/S Høgaberg er **til fiskiskap** verður manningin avroknað samsvarandi grein 43 í sáttmálanum millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini. Fer manningartalið upp um 45 eru partarnir samdir um at viðgera hýrupartin.

Partarnir eru samdir um, at manningin luttekur í landing til plattarnir standa á bryggjuni.

Tórshavn, tann 15. juni 2011

| | |
|---|---|
| Vegna Sp/F Framherja | Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag |
| Vegna Maskinmeistarafelagið | Vegna Føroya Fiskimannafelag |